




# 224 deyð í ferðsluni í Føroyum

*Tey umleið áttati árini, sum bilferðsla hevur verið í Føroyum, hevur hon kravt 224 mannalív. Meginparturin eru fólk í ungum árum. Tveir triðingar av teimum, sum eru deyð, hava verið yngri enn 24 ár*



Síðani fyrsti bilurin kom til Føroya fyrst í hesi øldini, er samfelag okkara nógv broytt. Men tað vit nevna "bilisman" fekk tó ikki fastatøkur á samfelag okkara fyrr nn fyrst í sjeytiárunum.

Frá, at tað seinast í sekstiárunum vóru einans um trýtúsund bilar í landinum og langt var í millum húsarhaldini, sum høvdu bil, fór stórbroyting fram næstu árini.

Miðskeiðis í sjeytiárunum var bilatalið tvífaldað og fyrst í áttatiárunum trýfaldað. Og talið av bilum vaks støðugt.

Seinast í áttatiárunum, tá bilatalið var upp í tað mesta, tað higartil hevur verið, var talið omanfyri 18.000 bilar. Hetta er seks ferðir fleiri bilar, enn tað vóru seinast í seksti árunum.

Fyrst í nítiárunum minkaði bilatalið nakað, men, nú er tað um at koma upp aftur á tað støði, sum tað var á í áttatiárunum.

Hesi trýati árini eru eisini stórbroytingar farnar fram í vegakervinum. Oyggjar eru bundnar saman, sprongt er fyri tunlum, nýggir vegir eru gjørdir og aðrir gjørdir betri og breiðari.

Í sekstiárunum var ferðmarkið í óbygdum øki 60 km/t og í bygdum øki 30 km/t. Fyrst í sjeytiárunum var ferðmarkið sett upp til 70 km/t í óbygdum øki og 50 km/t í bygdum. Seinni var ferðmarkið í óbygdum økið sett upp í 80 km/t.

Í dag kunnu vit ikki annað enn siga, enn at bilarnir fylla ein sera stóran part av okkara gerandisdegi og í mongum førum helst ov stóran.

Vit brúka beinini minni og minni og bilin meir og meir, ja til hvørt sneisaørindi. Onkur hevur sagt í skemti, at vit føroyingar í veruleikanum nýta bilin sum regnskjól, tí avstandirnir, sum mangan verða koyrdir, eru ikki longri, enn tað aðrastaðni er at ganga til og frá parkeringsplássinum.

Fáa staðni í heiminum man vera so stutt í millum bilarnar, sum í Føroyum. Hinvegin hava vit ikki so nógvar bilar í mun til fólkatalið, sammett við okkara grannalond. Har liggja Íslendingar á odda við minni enn tveimum fólkum upp á bilin, meðan vit í Føroyum hava um hálvt triðja.

At bilurin er eitt hent tól, eru vit helst øll á einum máli um. Men, um ikki rætt verður borið at, so er hann vandamikil. Hesi upp í móti áttati árini, at bilferðsla hevur verið í Føroyum, hevur hon kravt 224 mannalív. Meginparturin eru fólk í ungum árum, heilir tveir triðingar av teimum, sum eru deyð, hava verið yngri enn 24 ár.

Taka vit tey sum sluppu við lívinum, men fingu skaða, tosa vit um eitt tal, sum er fleiri ferðir størri.

Tað vísir seg, at talið av ferðsluvanlukkum er tætt bundið at talinum á bilum. Tá ið talið av bilum fór at økjast fyrst í sjeytiárunum, fór talið av ferðsluvanlukkum eisini at økjast – og av teimum áttati árunum, bilar hava verið í landinum,



eru fýra fimtingar av teimum álvarsligu ferðsluvanlukkunum hendar tey seinastu trýati árini.

Men tað er ikki bara talið á bilum sum er avgerðandi, tí sjálvandi hava umstøðurnar eisini sítt at siga, t.d. hvussu vegirnir og ferðsluumhvørvið sum heild er.

Eitt annað, sum hevur týdning, er hvørjar reglur eru galdandi. Her verður m. a. hugsað um ferðmarkið – hvussu skjótt loyvt er at koyra. Tað eru eingi viðurskifti í ferðslutrygdargranskingini, ið eru so væl skjalprógvað, sum sambandið millum ferð og ferðsluvanlukkur.

Úrslitið av hesi gransking er púra greitt: økir tú ferðina, økir tú eisini vandan fyri, at ferðsluvanlukkur henda. Og jú meira ferðin er, tess álvarsligari verða vanlukkurnar. Og ikki kann sigast annað, enn at tað sást aftur í hagtølunum, at ferðmarkið var sett upp fyrst í sjeyti árunum.

Talið av álvarsligum ferðsluvanlukkum í Føroyum var upp á tað mesta í 1986 og síðani tá hevur gingið rætta vegin. Hví so er, eru óivað fleiri svar uppá.

Men vit kunnu staðfesta, at í 1986 kom lóg í gildi, at tú skalt sita í bilbelti, tá ið tú situr í bili.

Vit kunnu eisini staðfesta, at í 1988 kom lóg í gildi, sum gjørdi galdandi, at koyrir tú 30 km/t skjótari enn tað loyvda, missir tú koyrikortið. Í somu lógarbroyting kom eisini í gildi, at tú missir koyrikortið, hevur tú meiri enn 0,8 promillu av alkoholi í blóðinum.

Tað man ikki vera av leið at siga, at hesar lógar- broytingar hava havt eina positiva ávirkan á gongdina. Og tað kunnu vit ikki annað enn fegnast um. Hetta er eitt prógv um, at tað loysir seg

*At bilurin er eitt hent tól, eru vit helst øll á einum máli um. Men, um ikki rætt verður borið at, so er hann vandamikil. Hesi upp í móti áttati árini, at bilferðsla hevur verið í Føroyum, hevur hon kravt 224 mannalív*

at seta skilagóðar lógir og reglur í gildi. Tíverri er tað so, at síðani 1988 er stígur komin í á hesum øki.

Skulu vit arbeiða eftir teimum stevnumiðum, sum liggja í Null-hugsjónini í Føroyum, so er neyðugt alla tíðina at gera dagføringar, ikki minst í reglum og lógarviðurskiftum.

**Kelda: Ferðslutrygd**
**www.rff.fo**